*9.a í Felagsskúlanum á Oyrarbakka*

Til Løgtingið

**Løgtingsmál nr. 2/2010: Uppskot til samtyktar um at fáa súkklubreytir knýttar at vegakervinum í Føroyum**

**Uppskot
til
samtyktar**

Heitt verður á Løgtingið um at gera soljóðandi broyting í løgtingslóg nr. 51 frá 25. juli 1972 um landsvegir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 18 frá 8. mai 2008, soleiðis at súkklubreytir verða knýttar at vegakervinum í Føroyum.

"**§ 6.** Við tí endamáli at kunna koma tørvinum hjá eini vaksandi ferðslu á møti og at kunna gera umstøðurnar hjá teim ferðandi so góðar sum gjørligt, verður landsstýrið heimilað at knýta súkklubreytir at vegakervinum í Føroyum".

**Viðmerkingar**
Endamálið er at leggja tryggar og góðar súkklubreytir at øllum vegakervinum í Føroyum

Vit ynskja at fremja uppskotið fyri at økja trygdina hjá fólkum, ið ynskja at nýta súkklu til flutning. Sum viðurskiftini eru í dag, er størri vandi fyri álvarsligum ferðsluvanlukkum, tí súkklur/prutl ferðast á somu vegum sum onnur akfør t.d. bilar og lastbilar.

Gera vit eitt súkklubreytakervi, fáa fleiri høvi at velja súkkluna fram um bilin sum flutningstól. Fólkaheilsan betrast, og $CO_2$ útlátið minkar.

Aðrir fyrimunir eru møguleiki fyri øktari ferðavinnu.

Kostnaðurin fyri ætlanina lata vit Landsverk um.

**Á Løgtingi, tann 8. februar 2010**

Kristian Martin Juul Rói Hansen Jónas Johannesen

Amanda Jensen Fríðunn Jacobsen

Katrin Dánjalsdóttir